*Stórar fløgur gerast í betri havn*

# Scrabster vil tæna føroyskari oljuvinnu

*Skotski havnabýurin Scrabster er raknaður við aftur eftir kaldan dreym, har útbyggingin av Dounreayverkinum varð av ongum . Nú síggja tey møguleikan at útvega nógv arbeiðspláss sum supply-havn fyri oljuvinnuna í Norðuratlantshavi*



WEST OF SHETLAND LICENSED ACREAGE




Mánadagin koma seks umboð fyri myndugleikarnar í skotska havnabýnum Scrabster til Føroya á kunningarferð

Orsøkin stóra bjartskygni, sum hevur tikið seg, nú líkindi er fyri eini stórari oljuvinnu vestan fyri Hetland

Stórt arbeiðsloysi er í Norðurskotlandi og síðani avgjørt varð at steðga útbyggingini av kjarnorkuverkinum í Dounrey hevur svartskygni valdað

Nú skal vend koma í Myndugleikarnir í Scrabster ætla at gera býin til framtíðar veitingar supply - havn fyri oljuvinnuna vestan fyri Víst verður á, at Scabster skal hava sama týdning fyri hetta økið, sum Norðsjógvurin hevur havt tað fyri Aberdeen og Peterhead

Gjørd er longu ein ætlan fyri útbygging av havnini í Scrabster, eitt nu skal havnin dýpast og útbyggjast

Miðjað verður móti at útvega býnum og økinum nærhendis eini 3000 nyggj arbeiðspláss eftir bert fáum árum

**Eisini tæna oljufeltum á føroyskum øki**

Og tá fólkið í Scrabster tosar um at vera veitingarpláss fyri oljuvinnuni vestan fyri Hetland so er tað ikki nokk Tosað verður longu um at tæna eini komandi oljuvinnu á føroyskum øki eisini

Í røðu, sum ein av oddamonnunum í Scrabster, Geoffrey Minter, helt her fyri hálovaði hann nyggja útviklinginum og segði at Scrabster bjóðar seg fram at veita tænastur til komandi oljuvinnuna vestan fyri Hetland og eisini komandi oljuvinnu á føroyskum øki

Tað er m.a. í hesum sambandi, at umboð fyri havnamyndugleikarnar, vinnuna og onnur koma til Føroya Ætlanin er eisini at kunna seg við havnaviðurskifti her og mangt annað

Sosialurin hevur skilt, at umboðini úr Scrabster fegin síggja eitt samarbeiði við føroyingar, nú ein oljuvinna so spakuliga er við at taka seg upp á økinum millum Føroyar og Bretland

Scrabster liggur annars eisini væl fyri, tá hugsað verður um avgerðina hjá bretska oljuufelagnum BP at brúka oljuterminalin í Flotta á Orknoyggjum í sambandi við framleiðsluna frá Foinaven-feltinum

Tað er greitt, at við hesi avgerð, verður Hetland, sum annars hevur fingið nógv burtur úr oljuvinnuni í Norðsjónum, við sviðusoð.

jan

## Her er stuttligt




Nú eru tey komin, fløgan og bandið við løgum og sangum um og fyri B36 Men ikki bert orð og løg, sum hóva viðhaldsfólkum hjá hesum bóltfelag, men eisini annað av áhuga fyri tónleikaáhugaðð yvirhøvur Innihaldið á hesi framleiðslu er nevniliga øðrvísi, er nógv meira fjølbroytt enn vit eru von við, tá talan er um fótbóltstónleik

Tað er stuðulsfelagið hjá B36, Floksmenn, sum eru framleiðararar, og so frægir tónleikarar sum Terji Rasmussen, Hjalti Joensen, Kolbein Simonsen, Robert Mc Birnie, Hallur Johannesen, Rókur Jakobsen og Kari Poulsen eru at finna á fløguni Saman við m.ø. Maluni Thomsen, Runu á Heygum, Hera Kragesteen, Eyðun Nolsøe og limum úr Tórshavnar Manskori og Bjarna Restorff So her er nakað fyri øll

Sangurin, sum Louis Zachariassen gjørdi til B36, Rennið dreingir, við lagi eftir Gunnar Mikkelsen, er við, og somuleiðis sonevndi B36-marsjurin í nyggjari útseting fyri hornkvintett Kenda duoin Lokum – Hallur og Rókur – hevur tvey løg við, Charlie er annað, og Terji hevur trý nýgjørd løg, m.a. tittullagið Her er stuttligt Robert Mc Birnie hevur saman við dreingjum hjá B36 eina umyrking av eyðkendum enskum fótbóltssangi Og Heri Kragesteen og Petur Eiriksson royna seg eisini sum tóna- og orðasmiðir

Tónleikurin spennir líka frá tí kenda og siðbundna, tá talan er um B36 og fótbóltsrómantík yvirhøvur, yvir tað meira skemtiliga, eggjandi og freka, til tann meira poetiska og sveimandi tónan Jú, her er stuttligt

Bandið og fløgan fáast á bensinstøðum í Havn og í Klaksvík, umframt hjá plátuhandlunum Bandið kostar 80 kr og fløgan 130 kr

